# Børn og lestur – ein



Sìmun og Durid saman við børnunum Silasi, Mirjam og Ísaki, sum eru uppvaksin við lesandi foreldrum. Myndin varð tikin í summar, áðrenn Rósa, sum nú er ein mánað gomul, varð fødd.

Tað eru fleiri, sum ivast í, um tað ber til at lesa, tá børnini eru komin.

Tað eru enntá tey, ið setast aftur við lesnaðinum, tí tey síggja seg ikki før fyri at fara undir eina útbúgving og møguliga flyta av landinum við børnunum.

Vit hava tosað við Durid Johansdóttir Olsen, sum hevur fingið trý børn við manninum, Símuni, meðan tey hava lisið í Keypmannahavn.

**– Tað er eingin forðing at hava børn meðan man lesur, heldur tvørturímóti, sigur Durid Johansdóttir Olsen. Meðan tey hava lisið, hava Durid og maðurin Símun fingið trý børn, og fyri einum mánaði síðani varð fjórða barnið borið í heim.**

LESNAÐUR

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

í august 1998, bert 14 dagar eftir, at tey vórðu gift, fóru Durid og Símun Olsen niður til Keypmannahavnar at lesa. Hon fór at lesa til pedagog og hann jarðfrøði.

Nú, tólv ár seinni, situr Durid og gevur fjórða barninum bróst, meðan vit práta. Hon hugsar um lestrartíðina, sum kanska hevur verið eitt sindur a-typisk, men sum absolutt hevur verið góð.

– Eg byrjaði at lesa í august 98, og í januar 2001 átti eg Miriam. Eg var als ikki bangin fyri, at tað skuldi ganga útyvir lesnaðin at fáa eitt barn mitt í tí heila. Eg var øgiliga spent, og lesnaðurin var ikki so harður, so tað passaði væl inn, sigur Durid. Hon var sjálv í farloyvi í eitt hálvt ár, og maðurin Símun tók eitt hálvt ár, áðrenn tey hildu fram við lesnaðinum.

## Næsta barnið

Durid gjørdi seg lidna sum pedagog og fór beinanvegin at lesa víðari til teknmálstulk, sum ætlanin hevði verið allatíðina.

– Eg byrjaði at lesa til tulk í september 2002, og í 2004 átti eg Ísak. Tá var støðan ein onnur, enn tá eg átti Miriam, tí tað var hart og ein meiri krevjandi lesnaður fyri meg. Tá hugsaði eg rættiliga nógv um, hvussu tað mundi fara at ávirka lesnaðin, greiðir Durid frá.

– Eg var bangin fyri, at eg fór at gloyma teknmálið og teknikkin, um eg skuldi vera burturfrá í farloyvi í eitt ár.

Men tað vísti seg, at stúranin var ógrundað.

– Tá eg byrjaði aftur, kundi eg væl fylgja við, og tað, sum eg hevði lært, áðrenn eg fór í barsil, sat tíbetur fast. So tað var ikki so ringt, sum eg var bangin fyri.

## Heim og niðuraftur

Men sum tað nærkaðist Durid at gerast liðug, kendist lesnaðurin tyngri og tyngri. – Lesnaðurin gjørdist meiri og meiri krevjandi, vit fingu nógvan kritik allatíðina, og eg gjørdist sera skúlatroytt. Mær longdist heim, og tá Símun fekk boðið starv í Føroyum, gjørdi eg av at gevast, so vit kundu flyta heim aftur.

Tá tey í februar 2006 vóru komin heim var Durid við barn. Men meðan Símun fór til arbeiðis, mátti Durid vera heima, tí børnini sluppu ikki inn á nakran stovn.

– Miriam var tá 5 ára gomul og hevði ótrúliga stóran tørv á at vera saman við øðrum børnum. Hon var jú von við at vera í barnagarði, so tað var ringt fyri hana, minnist Durid. Eisini Ísaki longdist eftir at sleppa í samband við onnur børn. Men einki pláss var fyri børnunum fyrr enn í august/september.

Og í oktober 2006 átti Durid triðja barnið, Silas.

– Eftir at eg hevði átt Silas, fekk Símun eitt spennandi starv í Grønlandi. Vit gjørdu av at fara øll somul í eina tíð, og í fimm mánaðir búðu vit í Grønlandi. Men tá fekk eg aftur hug til at gera meg lidna sum teknmálstulk, minnist Durid.

Durid fekk góðan stuðul bæði frá manninum og frá mammu síni, sum eggjaðu henni til at flyta aftur til Danmarkar at gera seg lidna.

– Eg hugsaði, at um eg slapp inn aftur, um børnini fingu stovnspláss og um vit fingu eina íbúð aftur í sama stað, sum vit búðu áðrenn, so skuldi eg fara. Og tá allir brikkarnir fullu uppá pláss, flutti eg einsamøll niðuraftur við trimum børnum.

## Trý børn og lesnað

Símun helt fram at arbeiða í Grønlandi. Hann var 3 vikur heima og 6 vikur burturi. Men